# Høvuðsstaðurin eigur framtíðina




**BARNARÓÐUR** Aftur hesa ferð vóru tað genturnar av Argjum og dreingirnir hjá Havnar Róðrarfelag, sum vunnu kappingarnar á 250 metrum

Tróndur Arge

Hóast høvuðsstaðurin ikki hevur vunnið so nógv higartil í ár, sum bátarnir á Argjum, hjá Knørri og hjá Havnar Róðrarfelag plaga at vinna, so er áhugin í høvuðsstaðnum stórur fyri kapproðri. Tað sást eisini á luttøkuni.

Um barnaróðrarnir eru góð ábendingum, hvussu tað verður í framtíðini, so stendur væl til í høvuðsstaðnum. Teistin av Argjum vann gentukappingina í barnaróðrinum á Norðoyastevnu, og á Sundalagsstevnu endurtók Teistin sigurin.

Títlingur hjá Havnar Róðrarfelag var fremstur á Norðoyastevnu í kappingini millum dreingjabátar á 250 metrum, og í Hvalvík endurtóku dreingirnir á Títlingi sigurin.

**BARNARÓÐUR** GENTUR

**ÚRSLIT**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Teistin | 02:50.01 |
| 2 | Drekin | 02:51.02 |
| 3 | Spógvin | 02:53.16 |
| 4 | Fípan Fagra | 02:56.21 |
| 5 | Jallurin | 03:02.01 |
| 6 | Beinta | 03:03.13 |
| 7 | Ørnin | 03:04.13 |
| 8 | Svanur | 03:07.07 |
| 9 | Firvaldur | 03:12.10 |
| 10 | Tambar | 03:18.02 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Teistin | 14 |
| 2 | Spógvin | 11 |
| 3 | Fípan Fagra | 8 |
| 4 | Drekin | 6 |
| 5 | Jallurin | 6 |
| 6 | Ørnin | 6 |
| 7 | Beinta | 2 |
| 8 | Junkarin | 2 |
| 9 | Svanur | 1 |
| 10 | Firvaldur | 0 |
| 11 | Tambar | 0 |
| 12 | Heykur | 0 |

**BARNARÓÐUR** DREINGIR

**ÚRSLIT**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Títlingur | 02:46.11 |
| 2 | Havfrúgvin | 02:47.23 |
| 3 | Teistin | 02:49.11 |
| 4 | Drekin | 02:49.16 |
| 5 | Jallurin | 02:50.16 |
| 6 | Royndin Fríða | 02:54.10 |
| 7 | Tambar | 02:59.13 |
| 8 | Junkarin | 03:02.23 |
| 9 | Dúgvan | 03:06.04 |
| 10 | Frúgvin | 03:06.07 |
| 11 | Hulda | 03:10.14 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Títlingur | 14 |
| 2 | Havfrúgvin | 12 |
| 3 | Drekin | 9 |
| 4 | Teistin | 9 |
| 5 | Jallurin | 6 |
| 6 | Royndin Fríða | 4 |
| 7 | Tambar | 2 |
| 8 | Heykur | 0 |
| 9 | Dúgvan | 0 |
| 10 | Frúgvin | 0 |
| 11 | Hulda | 0 |
| 12 | Junkarin | 0 |

# Drekin snýtti Erlu Kongsdóttir

**5-MANNAFØR KVINNUR** Eftir at tær úr Fuglafirði leingi høvdu verið fremstar, hefti einki í endaspurtinum fyri Drekanum hjá Havnar Róðrarfelag

Tróndur Arge

Soleiðis sum henda kappingin myndaðist á Norðoyastevnu, so var tað ilt at ímynda sær annan vinnara í hesi kappingini á Sundalagsstevnu enn Erlu Kongsdóttir úr Fuglafirði.

Í Klaksvík var Erla Kongsdóttir tað mesta av tveimum bátslongdum frammanfyri Drekan. Í startinum og ein fittan part av teininum var Erla Kongsdóttir fremst á Sundalagsstevnuni, og harvið var tað einki, sum bendi á, at tað skuldi ganga øðrvísi hesa ferð, enn tað gjørdi fyri einari viku síðani.

Men so við og við bjóðaði Drekin av. Endaspurturin var sera spennandi, bátarnir í miðjuni lógu leingi borð um borð og stavn um stavn, men tað vísti seg, at tær umborð á kvinnubátinum hjá Havnar Róðrarfelag vóru tær drúgvastu. Munurin var tó ikki stórur: bara sjálvur stavnurin og kanska eitt evarska lítið singur aftrat.

Úrslitið leygardagin bar við sær, at tað nú er púra javnt í FM kappingini.

Eingin spenningur var um hini trý plássini. Blikur, sum eina løtu var væl við, var meiri enn tvær bátslongdir aftanfyri Erlu Kongsdóttir og meiri enn tríggjar bátslongdir frammanfyri Firvald, sum aftur var fleiri bátslongdir frammanfyri Havfrúnna.

**ÚRSLIT**

1 Drekin 05:37.11
2 Erla Kongsdóttir 05:37.21
3 Blikur 05:45.09
4 Firvaldur 05:57.05
5 Havfrúgvin 06:06.06

**STØÐAN**

1 Drekin 13
2 Erla Kongsdóttir 13
3 Blikur 9
4 Firvaldur 9
5 Havfrúgvin 6

# Hesa ferð syftu vágsdreingir Blik

**5-MANNAFØR DREINGIR** Royndin Fríða úr Vági, sum fyri viku síðani var tætt við, vann lutfalsliga trivaligan sigur á Sundalagsstevnuni

Tróndur Arge

Tað eru knotur í kapproðrinum í Vági. Í hvussu so er í dreingjamanningini og manningini á 6-mannafarinum.

Á Norðoyastevnu var tað nær við og næstan hjá dreingjunum umborð á Royndini Fríðu. Teir hava vant síðani eina ferð í vetur, og tí vóru teir sjálvandi vónbrotnir, tá ið upptøkurnar á málinum í Klaksvík vístu, at Blikur av Argjum var stavnin fyrri á mál enn hvíti og svarti báturin úr Vági.

Hesa ferð hilnaðist tað betri hjá Royndini Fríðu, og tí sigur tað seg sjálvt, at fagnaðurin var óførur á vágbingunum, tá ið teir fingu boðini um, at teir høvdu vunnið. Møðin tókst hvørva sum døgg fyri sól, meðan dreingirnir á Bliki, sum aftur hesa ferð høvdu verið við til at mynda tætta og fína kapping, hingu við høvdinum.

Dreingjabátarnir bíðaðu leingi, men tá ið teir vórðu sendir avstað, var tað skjótt, at Vágs dreingir stungu seg fram um hinar. Royndir Fríða helt seg frammanfyri hinar allan teinin, og á málinum var munurin tað mesta av einari bátslongd.

Blikur, sum var fremstur í Klaksvík, fekk ikki so góðan start, men tað eydnaðist argjadreingjum at vinna seg fram á næstfremsta plássið. Suðuroyingar gjørdu rættuliga um seg, tí Firvaldur endaði á triðja plássi.

**ÚRSLIT**

1 Royndin Fríða 05:22.22
2 Blikur 05:24.15
3 Firvaldur 05:26.06
4 Svanur 05:29.06
5 Teistin 05:30.03
6 Jallurin 05:32.04
7 Sílið 05:34.20
8 Junkarin 05:38.17
9 Beinta 05:51.08

**STØÐAN**

1 Blikur 13
2 Royndin Fríða 13
3 Teistin 7
4 Jallurin 7
5 Svanur 6
6 Firvaldur 5
7 Sílið 4
8 Junkarin 1
9 Beinta 0